# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 10
November 2011

ISSN 1603-0036



Margretha II og Heindrikkur prinsur á vitjan í Føroyum
Mynd: Scanpix

Tríggjar nýggjar frímerkjaútgávur
Útgávuætlanin 2012
Vel ársins vakrasta frímerki 2011
Ársins endasøla

Posta
FAROE ISLANDS







FO 724




Royndarprent

# Margretha II - Drotning í 40 ár

Tann 14. januar 2012 eru 40 ár liðin síðan hennara hátign Margretha drotning II tók við donsku trúnuni og varð sett sum drotning av Danmark. Margretha drotning er ríkisleiðari í danska ríkisfelagskapinum, ið umfatar Danmark, Grønland og Føroyar. Í samband við 40 ára merkisdagin hjá Drotningini, útgevur Posta, saman við Post Danmark og Post Greenland, eitt frímerki og eitt smáark.

Margretha drotning varð borin í heim tann 16. apríl 1940 á Amalienborg í Keypmannahavn. Foreldur hennara vóru táverandi krúnprinsurin Fríðrikur, seinni Fríðrikur kongur IX av Danmark, og krúnprinsessan Ingrid. Í 1944 og 1946 fekk krúnprinsaparið tvær døtur afturat, prinsessurnar Benedikte og Anne-Marie av Danmark.

Tann lítla prinsessan varð doypt tann 14. mai 1940 í Holmens Kirke í Keypmannahavn. Hennara fulla navn gjørdist Margrethe Alexandrine Þórhildur Ingrid. Um hetta mundið høvdu kvinnur ikki arvarætt til krúnuna, so tað var ikki fyrr enn arvalógin frá 27. mars 1953 varð samtykt, at Margretha gjørdist krúnprinsessa av Danmark. Tann 16. apríl 1958 gjørdist Margretha krúnprinsessa limur í Ríkisráðnum og virkaði sum leiðari av ríkisráðsfundunum, tá Fríðrikur kongur ikki var tøkur.

**Útbúgving**

Margretha prinsessa fekk sína fólkaskúlaútbúgving á Zahles Skole í Keypmannahavn frá 1946 til 1955. Tey fyrstu árini gekk frálæran tó fyri seg heima á Amalienborg. Eftir eitt stutt skeið á kostskúla í Onglandi (1955-56) fór hon á studentaskúla og tók nýmálsligt studentsprógv á Zahles Skole í 1959.

Í 1960 tók krúnprinsessan Margretha filosofikum við fróðskaparsetrið í Keypmannahavn. Í 1960-61 las hon fornfrøði á University of Cambridge í Onglandi. Í tíðarskeiðinum 1961-62 las hon samfelagsfrøði á fróðskaparsetrinum í Århus, í 1963 las hon í Sorbonne í Fraklandi og í 1965 var hon á London School of Economics.

**Hjúnarlag**

Í 1967 giftist krúnprinsessan Margretha franska diplomatinum Henri Marie Jean André greiva de Laborde de Monpezat, ið við giftuni gjørdist Heindrikkur prinsur av Danmark. Tey fingu tveir synir, Fríðrik krúnprins, ið varð føddur tann 26. mai 1968 og Joakim prins, ið varð føddur tann 7. juni 1969.

**Frá krúnprinsessu til drotning**

Tann 14. januar 1972 doyði Fríðrikur IX. Dagin eftir varð krúnprinsessan staðfest sum Margretha drotning II, av táverandi forsætismálaráðharra Jens Otto Krag í borgargarðinum við Christiansborg.

Hennara hátign Margretha drotning II er konstitutionellur ríkisleiðari í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Tað vil siga, at hon sum drottur ikki hevur politiskt vald – tað liggur hjá teimum demokratiskt valdu lóggávutingunum.

**Drotningin og Fólkatingsval**

Tá val skal skrivast út til danska Fólkatingið, vitjar sitandi forsætismálaráðharrin



Drotningina og letur henni sína fráfaringarumbøn. Tá valið er av, heldur Drotningin eitt sokallað Drotningarumfar, har tvey umboð fyri hvønn valdan flokk vitja hana og viðmæla ein leiðara til nýggjar stjórnarsamráðingar. Hesin persónurin verður síðan innkallaður og útnevndur til formellan samráðingarleiðara. Tá samráðingarnar eru av og nýggj stjórn skipað, vitjar nýggi forsætismálaráðharrin saman við ráðharrunum aftur Drotningina til endaliga góðkenning.

**Ríkisráð**

Eina ferð um vikuna verður eitt sokallað ríkisráð hildið í Danmark, har Drotningin hittir forsætismálaráðharran og stjórn. Á hesum fundi verður Drotningin ella hennara varafólk kunnað um stjórnararbeiðið. Tað er eisini á hesum fundi, at Drotningin skrivar undir nýggjar lógir saman við ráðharra.

**Nýggjársrøðan**

Á hvørjum ári, tann 31. desember, heldur Margretha drotning nýggjársrøðu, ið verður send beinleiðis í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Hesin siður er sera væl umtóktur í øllum ríkinum, og hóast Drotningin ikki skal taka støðu til politisk mál, hendir tað seg, at onkur viðmerking fellur um mannarættindarlig ella moralsk mál.

**Aðrar skyldur**

Sum ríkisleiðari skal Drotningin standa á odda fyri almennum vitjanum, bæði tá hon sjálv vitjar fremmand lond og tá fremmandir ríkisleiðarar vitja Danmark.

Danska drotningin er formelt ovasti fyri donsku verjuna. Tað er eisini Drotningin, ið formelt bjóðar sendiharrum frá fremmandum londum vælkomnum til Danmarkar. Harafturat hevur Drotningin mangar umboðandi skyldur í sambandi við ársdagar, vígslur, frumframførslur, tá heiðursmerki skulu handast og so framvegis.

Einaferð um árið ger Drotningin eina sokallaða summarferð, har hon vitjar danskar býir, oftast umborð á kongaskipinum Dannebrog. Henda summarferðin verður við jøvnum millumbili víðkað til eisini at umfata Føroyar og Grønland. Mannsterka uppmøtingin til hesar vitjanir bera boð um ein sera væl umtóktan ríkisleiðara.

**Drotningin og Føroyar.**

Síðan 1380 hava Føroyar verið partur av danska kongaríkinum. Fyrst sum norskt skattland, síðan við beinleiðis tilknýti til Danmark. Hóast politiska rákið hevur ført økjandi politiskt sjálvsræði við sær, er Margretha drotning sera væl umtókt millum føroyingar, ið hava fylgt henni síðan hon sum barn vitjaði oyggjarnar fyrstu ferð. Fyrst saman við pápanum, Fríðriki IX- og seinni sum vaksin drottur við egnari familju. Hennara innlit og vitan um føroyska søgu og viðurskifti eru høgt í metum og ongin ivi er um, at stórur partur av føroyingum gleðast um hennara vitjanir.

Margretha drotning II er drotning føroyinga, eins væl og grønlendinga og dana – ongin ivi um tað.

*Anker Eli Petersen*




FO 725-728

Royndarprent

# Sjónotur - havsins blómur

Sjónoturnar eru skyldar við hvalspýggjur og korallir (koralldýr). Felags fyri hesar tríggjar dýrabólkar er tann rundi bygnaðurin av kroppinum. Nógvir armar, eisini nevndir tentaklar ella finnur, eru kring munnin í øðrum endanum av dýrunum. Sjónotan hevur í hinum endanum ein súgfót, ið hon kann súgva seg fastan við á hart undirlag. Slíkan súgfót hevur hvalspýggjan ikki og ferðast í sjónum við havstreymunum. Sjónotan hevur ikki beinagrind eins og korallirnar og hon er sjálvstøðug vera meðan korallirnar eru samansettar av mongum dýrum, ein sonevnd koloni.

Tær litføgru sjónoturnar eru rættiliga eyðsýndar. Sprøkluti liturin og skapið gevur hugmyndasamband við plantuheimin og hevur verið íblástur til felags vísindaliga heitið Anthozoa (úr grikskum: antho=blóma og zoa=dýr), meðan stingandi eginleikin hjá sjónotuni hevur ávirkað føroyska heitið.

Sjónotan livir í øllum heimshøvunum frá heilt grunnum til meiri enn 10.000 metra dýpi. Fleiri sløg halda til í havnalagnum ella á helluni beint undir vatnskorpuni, har tær eru meira eyðsýndar enn vanligi blágrøni og brúni liturin, ið vanliga er at síggja. Av hesi orsøk kenna tey flestu, ið hava eitt tilknýti til havið, hesar sermerktu verur. Verður sjónotan órógvað, dregur hon armarnar inn í rørkenda kroppin og umskapast til eina goskenda hálvkúlu við einum holi í erva.

Hóast blómukenda líki, eru flestu sjónoturnar rovdýr. Á yvirflatuni hevur sjónotan serstakar kyknur, nevndar notukyknur, ið kunnu eitra og lemja. Armarnir hava serliga nógvar av hesum notukyknum, á hvørjum armi kunnu vera umleið 2 milliónir. Notukyknurnar lemja fongin, sum síðan verður førdur til munnin og etin.

Fyri at festa seg krevur sjónotan eitt fast undirlag. Spakuliga, minni enn 10 cm um tíman, kann hon flyta seg. Nøkur sløg eru, ið kunnu sleppa festinum og reka við streyminum og onnur nýta armarnar at svimja við, tá sleppast skal undan fíggindum.

Av fíggindum hjá sjónotuni kunnu nevnast bertáknur, fiskar og krossfiskar. Sjónotur hava tann henta eginleikan, at tær kunnu endurgera likamslutir. Missa tær ein likamslut, t.d. ein arm, veksur



Mynd: Ingi Sørensen

hesin út aftur.

Tað er vanligt at síggja sjónotur sitandi á øðrum dýrum, eittnú á gággukrabbanum. Á henda hátt fær sjónotan meiri føði, bæði tí hon verður førd víða, og eisini hevur atferðin hjá gággukrabbanum við sær, at meiri fongur verður drigin at sjónotuni. Afturfyri verjir sjónotan gággukrabban ímóti krabbadýrasnýkum.

Sjónotan nørist bæði kynjað við sili og rogni og ókynjað við at skilja ein lítlan part burtur av súgfótinum. Hetta lítla petti veksur til eina sjónotu og er sostatt ein klon av móðirdýrinum.

Havlívfrøðingar meta sjónoturnar sum ein torføran bólk at navngreina. At goyma tær til vísindaligt endamál krevur serligan framferðarhátt og servitan krevst fyri at tryggja, at navngreiningin er røtt. Hóast føroyska sjónotutilfeingið ikki er kannað til fulnar enn, kann tað lýsast sum norðurlendskt við nøkrum sløgnum úr íshavinum. Higartil eru staðfest 30 sløg av sjónotum í føroyskum øki, men væntandi eru enn fleiri sløg.

Støddin á teimum føroysku sløgunum er ógvuliga ymisk. Tvørmátið á fullvaksnum dýrum hjá tí størsta slagnum Bolocera tuediae er 30 cm, meðan tað er umleið 2 mm hjá Edvardsia danica. Longsta slagið um okkara leiðir er vanligur sjónelikur (Metridium senile), ið kann gerast hálvan metur til longdar.

Nøkur sløg kunnu gerast rættiliga gomul, dømi er um eina sjónotu av slagnum Actinia equina, sum hevur livað í akvarium í samfull 66 ár. *Ámundur Nolsøe*










FO 729-730

Royndarprent



# Landnámsdjór

**Gorfuglur**
Latín: *Pinguinus impennis*

Gorfuglurin er álkufuglur av sama slagi sum lomvigin, fullkubbin, álkan og lundin. Allir hesir liva ella livdu í Norðuratlantshavi. Gorfuglurin var tann størsti, hann kundi bliva upp til 70 cm høgur. Sum hinir álkufuglarnir er hann ljósur á búkinum og svartur á bakinum, men so hevur hann ein sermerktan hvíta blett á báðum síðum á høvdinum millum eygað og nevið. Hann kundi ikki flúgva, veingirnir vóru eins smáir og teir hjá pingvinunum í Suðuratlantshavi. Líka so kvikur hann var í sjónum og veiddi fisk eins klombrutur var hann á landi.

Gorfuglurin livdi í stórum gorfuglabølum framvið strondini  báðu megin Norðuratlantshavið. Restir av honum finnast enn í køstum frá steinøldini og fram til víkingaøldina.

Tað gjørdist lagnan hjá gorfuglinum at hann var so lættur at fáa hendur á og slakta. Longu í 15. øld var gorfuglurin stórt sæð horvin úr Norður-Evropa, men tó vóru framvegis stór bøli í Grønlandi, Íslandi, Newfoundlandi, Baffin Island og við Labrador. Tá fiskiskapurin eftir toski við Newfoundlandi og stórhvalaveiðan í Norðuratlantshavi tók seg upp var lagnan hjá gorfuglinum avgjørd. Skipini høvdu bara proviant til túrin út og so vórðu gorfuglarnir fangaðir - livandi ella dripnir - og tiknir umborð á skipið sum proviant til túrin heimaftur.

Tað kendasta bølið var á Penquin Islands (í dag Funk Island), ið liggur í ein landnyrðing úr Newfoundlandi. Har vóru teir seinastu dripnir uml. ár 1801-1802. Tá var man blivin greiður yvir hvussu sjáldsamur gorfuglurin var og øll tey evropisku søvnini vóru til reðar at gjalda stórar upphæddir fyri at fáa fatur á einum gorfuglahami at stappa út. Teir seinastu vórðu tiknir í 1844 á lítlu oynni Eldey sunnan fyri Reykjanes í Íslandi, men óváttaðar eygleiðingar av gorfugli sigast at hava verið í 1848 í Vardø í Noregi og fleiri ferðir í Grønlandi uml. 1850. Men nú er fuglurin útdeyður.



Í Føroyum var gorfuglurin vanligur summargestur, men ongi prógv eru fyri at hann nakrantíð átti í Føroyum. Tann seinasti var tikin á Stóru Dímun 1. juli í 1808.

Nøkur fá útstappaði eintøk av gorfuglinum eru til enn. M.a. keypti Ísland ein gorfugl, sum í dag stendur á Náttúrugripasavninum í Íslandi. Zoologisk Museum í Keypmannahavn hevði gorfuglin sum logo fram til 2004. Ole Worm fekk fatur á einum livandi gorfugli til sítt egna savn Wormianum. Hesin fuglur varð teknaður við einum ringi um hálsin og hildið verður at tað var eitt tjóður.

Gorfuglurin er eitt dømi um at djór verða oydd fyrst og fremst vegna vantandi kunnleika um stovnin. Illa ber til at lasta fiskimenninar tá á døgum, tí teir høvdu ikki teir samskiftismøguleikar, sum vit hava nú á døgum. Men søvnini kundu havt gjørt eina roynd at bjarga gorfuglinum í staðin fyri at verða við til at geva honum banahøggið.

**Dímunarseyðurin**
Latín: Ovis aries

Summarið 1844 var danski krúnprinsurin, seinni Fríðrikur Kongur VII í Føroyum. Í fylgi hansara var Japetus Steenstrup, ein ungur djórafrøðingur, sum var við á ferðini fyri at savna inn náttúrusøguligar lutir til  Det kgl. Naturhistoriske Museum í Keypmannahavn. Brotið niðanfyri er tikið beinleiðis úr dagbókini á  Zoologisk Museum, dagfest tann, 23. august 1844:
”H.K.H. Kronprinsen forærede ved Hr. Lektor Steenstrup Museet følgende gjenstande:
1. Skelet af en 18 Fod lang Delphinus globiceps. (Grindehval)
2. Den vilde Varietet af det Færøske Faar ♂. Ved basis af Hornene og om Ørene mangle Haarene. Craniet fulgte løst med.
3. Den samme ♀ ad. Godt konserveret. Craniet fulgte løst med.
4. Den samme ♂ juv. Vædderlam. Godt konserveret. Craniet fulgte løst med.”



Í 1983 komu tríggir seyðir til Føroya í samband við at Norðurlandahúsið í Føroyum lat upp. Hesir seyðir kunnu í dag síggjast á framsýningini á Føroya Fornminnissavni.

Seyðirnir eru smáir og svartir og teir minna nógv um Soay-seyðirnar, ið liva vilt á Skt. Kilda í Suðuroyggjum. Teir kallast eisini geitaseyðir, tí bæði ær og veðrur hava horn. Ærnar hava tó klænri og minni horn enn veðrarnir. Dímunarseyðurin er eisini kynbøttur í mun til Soay-seyðin, ið er ljósur undir búkinum eins og tann villi seyðurin. Klæðir, ið eru funnin í útgrevstrum frá bronsuøldini eru av sama slagi sum ullin á Dímunarseyðinum, so longu tá, var man farin at kynbøta seyðin.

Teir tríggir seyðirnir frá Lítlu Dímun vóru ímillum teir seinastu av upprunaseyðunum í Føroyum, møguliga vóru tað hesir seyðir, ið víkingarnir høvdu við sær tá teir nomu land. Í einum útgrevstri á Eiði hevur man funnið ein hálvan skølt av einum slíkum seyði.

Víkingarnir høvdu sínar egnu seyðir við til Íslands og Grønlands og helst eisini til Føroya. Uml. ár 1600 herjaði hervilig seyðapest, sum nærum týndi allan seyðin í Føroyum. Aðrir seyðir vórðu tá innfluttir úr Hetlandi og úr Íslandi. Men teir smáu svørtu seyðirnir á lítlu Dímun hava sikkurt yvirlivað, inntil teir vórðu skotnir uml. ár 1860.

Ein frásøgn er frá hendingini, tá teir seinastu seyðirnir á Lítlu Dímun vórðu skotnir.

Í "Nationaltidende" 5. februar 1911 skrivar R. Müller m.a.:

*"De tiloversblevne var saa vilde, at de hellere frivillig sprang i Afgrunden end lod sig fange, og særlig nogle gamle Væddere og Moderfaar var aldeles umulige at komme nær. Saa maatte man tage sin tilflugt til Riflen, og den sidste rest blev nedskudt. Afdøde Købmand J. Mortensen, Stifter af Færøernes største Handelshus, der var en dygtig Riffelskytte, har fortalt mig, at han havde været med til at skyde flere af disse Faar og særlig, at han havde skudt det sidste Exemplar, en gammel Vædder, der var saa forsigtig, at det kostede ham stor Anstrengelse at komme den paa Skud."*

*Dorethe Block*



# Drotning í 40 ár





## Svartprent og snotilig frímerkjamappa

Í samband við frímerkjaútgávuna Drotning í 40 ár, sum er ein felagsútgáva millum Føroyar, Danmark og Grønland eru eisini nakrar servørur gjørdar, m.a. ein mappa við øllum teimum trimum smáørkunum í.

Harafturat verður eitt sokallað svartprent framleitt í avmarkaðari nøgd. Hetta er fyrstu ferð at Posta selur svartprent, sum eina serstaka vøru. Tað verður selt til uppi er, so tað ræður um at verða skjótur at bíleggja, um man vil ogna sær eitt eintak. Øll svartprentini eru talmerkt og signeraði av listamanninum Mikael Melby og myndristaranum Martin Mörck.

Mappan við teimum trimum smáørkunum kostar 45,- kr.
Svartprentið kostar 100 kr.

Harafturat fara vit eisini at selja vørurnar hjá Danmark og Grønlandi, ið hoyra til hesa útgávuna.Tað vil siga, at vit selja bæði frímerkini og smáørkini hjá Danmark og Grønlandi umframt fyrstadagsbjálvarnar. Tó selja vit ikki tey stempladu frímerkini.

Allar hesar vørur kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum, sum er í mitt í blaðnum umframt á www.stamps.fo.

# Útgávuætlan 2012

## 4. januar

### Drotning í 40 ár

- 14 januar 2012 hevur Margreta II verið drotning í 40 ár. Verður givið út sum eitt leyst merki og sum smáark. Virði: 10,50 kr. FO 724. **GG!** Verður send til haldarnar saman við útgávuni 20. ferbuar.




## 20. februar

### Sjónotur

- fýra einkultmerki, ið vísa sjónotur á havsins botni. Ingi Sørensen hevur tikið myndirnar. Eitt frímerkjahefti við átta sjálvklistrandi frímerkjum verður somuleiðis givið út.
Virði: 3,00, 6,50, 8,50 og 10,50 kr.
FO 725-728.




### Landnámsdjór

- tvey frímerki. Astrid Andreasen hevur teknað gorfuglin og Dímunar-seyðirnar. Virði: 13,00 og 21,00 kr. FO 729-730.



## 21. mars

### Norðurlandaútgávan 2012 - Lívið á Havninum - Bjarging á sjónum

- smáark við tveimum frímerkjum, ið lýsa bjarging á sjónum. Edward Fuglø legði til rættis.
Virði: 2 x 10,50 kr. FO 731-732.
**GG!** Verður send til haldarnar saman við útgávuni 30. apríl.




## 30. apríl

### Europa 2012: Ferðamál

– tvey einkultmerki. Fotomyndir ið vísa ferðamál í Føroyum. Tvey postkort verða somuleiðis givin út.
Virði: 6,50 og 10,50 kr. FO 733-734.

### Skrímsl

- fýra einkultmerki við tekningum eftir Edward Fuglø. Virði: 6,50, 11,00, 17,00 og 19,00 kr.
FO 735-738.



## 24. september

### Regin Smiður

- ark við seks merkjum. Anker Eli Petersen leggur til rættis. Virði: 6 x 11,00 kr. FO 739-744.

### Norðurlendsk samtíðarlist: Jan Håfstrøm & Edward Fuglø

- tvey einkultmerki við verkum eftir hesum báðum listamonnunum. Virði: 13,00 og 21,00 kr. FO 745-746.




### Gl. apotekið í Klaksvík 80 ár:

- eitt leyst merki. Fotomynd av gamla apotekinum í Klaksvík. Anker Eli Petersen leggur til rættis. Virði: 8,50 kr. FO 747.

### Jólasangir 3

- tvey einkultmerki, sum ímynda triðju røð av jóla-sangum. "Gleðilig jól" og "Jól hava eingla-ljóð". Anker Eli Petersen legði til rættis. Eitt hefti við átta frímerkjum og tvey postkort verða eisini givin út. Virði: 6,50 og 10,50 kr. FO 748-749.DKK.




### Postgjaldsmerki 2012

Fýra postgjaldsmerki.
Myndevnið er StreetArt (grafitti) Ung frá Margarinfabrikkini leggja til rættis.

## 5. november

Árbók, ársmappa (300,50 kr.) og jólamerki.
Janus Guttesen teknar ársins jólamerki.

*Gevið gætur! Útgávuætlanin kann broytast.*

# Ársins endsøla !

Hin 31. desember 2011 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.



FO 639-648



FO 632-637



FO 624-625



FO 627



FO 626

Árbók 2007






FO 649-650



FO 630-631

FDC-mappa 2007



Heftimappa 2007



Ársmappa 2007






FO 618-623



FO 628-629

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 4. januar og  20. februar 2012





Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Drotning í 40 ár** |
| Útgávudagur: | 04.01.2012 |
| Virði: | 10,50 kr. |
| Nummur: | FO 724 |
| Frímerkjastødd: | 43,39 x 53,5 mm |
| Tekningar: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Post Danmark Frimærker |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 g |




Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sjónotur** |
| Útgávudagur: | 20.02.2012 |
| Virði: | 3,00, 6,50, 8,50 og 10,50 kr. |
| Nummur: | FO 725-728 |
| Frímerkjastødd: | 28,0 x 40,0 mm |
| Photo: | Ingi Sørensen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | OeCd, Eysturríki |
| Postgjaldsbólkur: | Ískoytisvirði,smábrøv innanoyggja og til Evropa, 0-50 g. |





Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Landnámsdjór** |
| Útgávudagur: | 20.02.2012 |
| Virði: | 13,00 og 21,00 kr. |
| Nummur: | FO 729-730 |
| Frímerkjastødd: | 40 x 22,5 & 22,5 x 40 mm |
| Lagt til rættis: | Astrid Andreasen |
| Prentháttur: | Offset |
| Prentsmiðja: | Cartor Security, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til onnur lond 0-50 g og stórbrøv í Føroyum 101-250 g |

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn
Føroyar

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

Snið og uppsetan: Posta Stamps - Prentsmiðja: TrykTeam, Danmark